# Lívið kann eisini livast frameftir

**POUL MICHELSEN**
tingmaður



Formaður Fólkafloksins Jørgen Niclasen hevur í fyrstu røðu síni sum formaður floksins, bjóðað politisku flokkunum at gera eina búskaparliga semju. Semjan leggur upp til, at Føroyar - í seinasta lagi í 2015 - skulu hava ein sjálvberandi búskap. Hetta merkir, at innan ta tíð skal danski blokkstuðulin minkast niður í onki og, at vit tá skulu umsita og ábyrgdast av øllum málsøkjum sjálvi.

> *Formaður Fólkafloksins Jørgen Niclasen hevur í fyrstu røðu síni sum formaður floksins, bjóðað politisku flokkunum at gera eina búskaparliga semju. Semjan leggur upp til, at Føroyar - í seinasta lagi í 2015 - skulu hava ein sjálvberandi búskap*

Búskaparsemjan gongur út uppá, at vit brúka partar av árliga vøkstrinum í búskapinum til at minka um danska blokkin. Hetta skal vera yvirornaða málið, sum allir flokkar – uttan mun til politiskan lit annars - kunna taka undir við.

Í røðu sínari í samband við løgmansrøðuna bjóðaði formaður Fólkafloksins Jørgen Niclasen at gera ein búskaparliga semju við hinar politisku flokkarnar. Í uppkotinum liggur, at Føroyar skulu tillaga seg einum sjálvberandi búskapi innan 2015. Danski blokkstuðulin skal tá vera burtur. Eisini liggur í uppskotinum at hava eina fólkaatkvøða um, hvørja støðu Føroyar tá skula hava til Ríkisfelagsskapin.

Uppskotið hjá Fólkaflokkinum byggir á egnu fatan floksins og ikki minnst, á tær útmeldingar, sum í seinastuni eru komnar frá hinum politisku flokkunum, frá visjón 2015 álitinum og frá fleiri búskaparfrøðingum. Danski blokkurin er oftari til ampa fyri tann føroyska búskapin enn til gagns.

Tað tykist sum allir flokkar hava tikið væl ímóti innbjóðingini frá formanni Fólkafloksins. Allir flokkar síggja týdningin av, at Føroyar fáa ein sjálvberandi búskap sum skjótast.

Eg var tí ikki sørt bilsin, tá eg las viðmerkingarnar hjá Høgna Hoydal til uppskotið frá nýggja formanninum í Fólkaflokkinum, tí hóast Høgni sigur, - at hann IKKI skal gera seg til dómara yvir Fólkaflokkin, so ger hann lítið annað enn døma flokkin í viðmerkingum sínum til Sosialin.

Fólkaflokkurin skal broyta seg nógv, áðrenn Tjóðveldisflokkurin tekur Fólkaflokkin fyri fult og skal broyta skattapolitik, fiskivinnupolitik, búskaparpolitik, sjálvstýrispolitik v.m., áðrenn hann aftur er reinur nokk til at kunna sleppa í fínustovu saman við Høgna Hoydal og hansara fólki.

**Ein snertur av beiskni liggur í málbrúkinum**

Harmiligt, tí júst við eini búskaparsemju millum allar flokkar kundu vit fingið tillagað føroyska búskapin lagaliga til at verða sjálvberandi. Tá ongar peningaligar bindingar liggja ímillum Danmark og Føroyar longur, vil ein fólkaatkvøða uttan iva vera nógv áhugaverdari. Er blokkstuðulin ikki ein partur av Ríkisfelagsskapinum vil fólkaatkvøðan geva eina rætta mynd av, hvørji virði føroyingar leggja í Ríkisfelagsskapin. Mín persónliga fatan er, at stórur partur av føroyingum halda fast um Ríkisfelagsskapin einans orsaka av blokkstulinum.

> *At Høgni Hoydal – nú Fólkaflokkurin rættur hondina – á ein so beiskan og niðurgerandi hátt leggur eftir manninum heldur enn eftir bóltinum, kann bert botna í onkrum ringum og ófrættakendum, og rennur einum í hug tey uppslítandi og niðurbrótandi eljustríð, sum javnt og samt vóru millum fullveldisflokkarnar størsta partin av skeiðnum hjá fullveldissamgonguni og sum loksins tóku lívið av hesi. Skal føroyskur fullveldispolitikkur framhaldandi stjórnast afturlítandi?*

At Høgni – nú Fólkaflokkurin rættur hondina – á ein so beiskan og niðurgerandi hátt leggur eftir manninum heldur enn eftir bóltinum, kann bert botna í onkrum ringum og ófrættakendum, og rennur einum í hug tey uppslítandi og niðurbrótandi eljustríð, sum javnt og samt vóru millum fullveldisflokkarnar størsta partin av skeiðnum hjá fullveldissamgonguni og sum loksins tóku lívið av hesi. Skal føroyskur fullveldispolitikkur framhaldandi stjórnast afturlítandi ? Er ongin møguleiki fyri at liva lívið frameftir, og við virðing fyri tí grundleggjandi muni, sum er millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin.

Fólkaflokkurin er ein borgarligur fullveldisflokkur. Stevnuskrá floksins er púra greið. Hinvegin er Tjóðveldisflokkurin ein vinstrahallur loysingarflokkur. Fullveldismálið er kanska ikki einasta mál, sum flokkarnir hava felags, men so avgjørt tað sterkasta. At stór ósemja er millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin á so mongum økjum, eigur Tjóðveldisflokkruin at kunna seta til viks í støðutakanini til sjálva semjuna, og - uttan at eg annars skal diktera Tjóðveldisflokkinum, hvat hann skal meina – so dugi eg ikki at síggja nakra haldgóða grund fyri, at Tjóðveldisflokkurin ikki treytaleyst kann stuðla semjunroyndini. Sjálvt um tað eru mál, sum eg persónliga sá loyst øðrvísi, so er púra greitt, at grundarlagið fyri at halda fram í stríðnum fyri at vinna føroyingum fult ræði á egnum landi , er ikki í vanda á nakran hátt. Alt er bara ein spurningur um hvat VIT í Føroyum vilja.

> *Høgni Hoydal eigur at sleppa tápuliga "reinførisørðskapinum" um hvør er góður nokk og ikki. Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eru ymiskir á máli um allarflestu samfelagsuppgávur, men semjutilboðið frá formanni fólkaflokksins átti ikki at verið eitt av teimum*

Høgni Hoydal eigur at sleppa tápuliga "reinførisørðskapinum" um hvør er góður nokk og ikki. Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eru ymiskir á máli um allarflestu samfelagsuppgávur, men semjutilboðið frá formanni fólkaflokksins átti ikki at verið eitt av teimum.

Kierkegaard sigur nakað soleiðis, at lívið skal skiljast aftureftir, men livast frameftir og hesi orð átti Høgni Hoydal at lagt sær í geyma.

# Kierkegaard hevur rætt, Poul Michelsen

**HØGNI HOYDAL, FORMAÐUR**
Tjóðveldisfloksins



**Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin hava samtykt á løgtingi, at blokkurin skal vera burtur og øll mál á føroyskum hondum innan ávísa freist. Tjóðveldisflokkurin hevur síðani neyvt fylgt hesi samtykt og lagt øll neyðug uppskot fyri tingið, men tey eru feld. Tí er tað ósakligt, at Poul Michelsen nú lastar øðrum fyri vantandi samstarv**

Í lesarabrævi hartar Poul Michelsen undirritaða fyri at hava "lagt eftir manninum á ein niðurgerandi og beiskan hátt". Og "í reinførisørskapi" víst vantandi samstarvsvilja í sambandi við formansskiftið í Fólkaflokkinum.

Hetta er ikki so. Eg havi á ongan hátt lagt eftir manninum (Jørgen Niclasen), tiansheldur verið niðrandi og beiskur í mínum viðmerkingum um formansskiftið í Fólkaflokkinum. Um Poul Michelsen kann vísa á nakra útsøgn frá mær um persónin Jørgin Niclasen ella nakra niðurgerð av honum, so bíði eg í tolni. Kann hann ikki tað, rokni eg við at fáa eina umbering.

Týðiligt er at valstríðið er byrjað - við teimum somu gomlu fintunum. Men eg skal viðganga, at tað ger meg serliga vónbrotnan, at Poul Michelsen nú nýtir somu vápn sum samgongufelagar hansara: At leggja fólki orð í munnin. Síðani at harta tey fyri tað, tey ikki hava sagt – og so annars vóna at fólk eru stuttmint og ikki seta seg inn í málini.

**Standa við okkara sjónarmið**

Eg havi bert loyvt mær at vísa á, at broytingar mugu vísast í verki – tí okkum tørvar sanniliga broytingar í føroyskum politikki skulu vit røkka málinum um einar frælsar og sjálvberandi Føroyar.

Í tí sambandi havi eg nevnt somu mál og ynskir um broytingar, sum vit hava barst fyri alt hetta valskeiðið: Um sambandslógirnar, ið samgongan við fólkaflokkinum hava samtykt. Um ein skeivan búskaparpolitikk og skattapolitikk. Um eitt veruliga liberalt vinnulív. Og um sosialan ójavna.

At vit føra okkara politisku sjónarmið fram, átti neyvan at elvt til øsing. Serliga tí Poul Michelsen sjálvur hevur ført flestu av hesum sjónarmiðum fram á tingi – og ofta meiri ógvisliga enn vit hava. Haldi ikki, at tað er sakligt at nýta undirritaða og Tjóðveldisflokkin sum fíggindamynd til tess at vinna vælvild í sínum flokki.

> *At vit føra okkara politisku sjónarmið fram, átti neyvan at elvt til øsing. Serliga tí Poul Michelsen sjálvur hevur ført flestu av hesum sjónarmiðum fram á tingi – og ofta meiri ógvisliga enn vit hava. Haldi ikki, at tað er sakligt at nýta undirritaða og Tjóðveldisflokkin sum fíggindamynd til tess at vinna vælvild í sínum flokki.*

Viðvíkjandi uppskotunum um eina búskaparliga semju, sum Jørgen Niclasen hevur ført fram, so er ilt at skilja, hví Poul hartar Tjóðveldisflokkin. Ikki minni enn tvær ferðir hetta valskeiðið hava vit lagt uppskot fyri tingið um Búskapargrunn Føroya, har niðurskurðurin av blokkstuðlinum er innbygdur. Og á okkara fíggjarlógaruppskoti í fjør varð niðurskurðurin innroknaður.

Harafturat hava vit lagt fram uppskot um at fáa stór mál á føroyskar hendur. Samstundis hava vit gjørt greitt, at okkara uppskot eru upplegg, sum sjálvandi kunnu broytast og lagast til, so flestu flokkar kunnu taka undir við teimum. Vit hava eisini lagt stóra orku í at samstarva við samgonguna (og ikki minst við Poul Michelsen) um fólkakirkjuna. Øll vita helst, at hetta hevði verið eitt rok og klandursmál, um andstøðan á tingi var ein onnur.

**Ætlanin er samtykt**

Vit hava sostatt neyvt fylgt tí uppskoti um sjálvstýri Føroya fólks, sum Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin samtyktu í mars 2001. Har er ásett, at blokkstuðulin skal minkast burtur og øll mál fáast á føroyskar hendur innan 2008. Har er eisini gjørt greitt, at helvtin av búskaparvøkstrinum skuldi fara til niðurskurð í blokkstuðli og hin helvtin til aðrar raðfestingar á fíggjarlógini.

Hetta er samtykt á løgtingi og ikki sett úr gildi. Og tað var hetta sama uppskotið, sum minkaði blokkstuðulin við 366 mió. kr. Tí er ilt at skilja, at fólkaflokkurin dregur sama uppskot fram aftur sum nakað nýtt, og lastar okkum fyri ikki at vera við. Eisini er ilt at skilja, hví henda samtykt skal skjótast tvey valskeið út í framtíðina. Vit vilja bara sleppa í gongd sum skjótast at útinna samtyktina í verki – og eru altíð til reiðar til neyðugar tillaggingar saman við øðrum flokkum. Sjáldan hevur so nógv talað fyri at gera búskapin óheftan (haldi, at niðurskurðurin og fastfrystingin av blokkinum er týdningarmesta politiska avgerð í nýggjari tíð). Og sjáldan hevur tað staðið øllum so greitt, at vit mugu hava atgongd til allan heimin undir egnum flaggi og samleika.

Tí tað er rætt sum Poul Michelsen endurgevur Kierkegaard fyri at siga, at "lívið skal skiljast aftureftir, men livast frameftir". Ongin orsøk er at byrja frá nullpunktinum hvørja ferð – ella at selja royndirnar og væl fyrireikaðar ætlanir sum nýggjar uppfinningar í onkrum politiskum spæli. Tað ræður bert um at vísa orðini í verki.

Og tað var í veruleikanum bert tað, eg segði, tá eg viðmerkti formansskiftið í Fólkaflokkinum.